Øssur av Steinum:

Eg eri órættvíst viðfarin

– ALV-stýrið hevur havt eina tilvitaða ætlan við tí ákærandi skrivi, eg fyri stuttum fekk sendandi, og uttan at eg havi fingið møguleikan at verja meg, verðið eg nú sagdur úr starvi, sigur skúlastjórin á ALV-skúlanum við Áir í 32, Øssur av Steinum

- Tað var sagt í skrivinum frá ALV-stýrinum, at eg var gamal, ósamarbeiðsvilligur, ónýtiligur, hevði givið skeivar upplýsingar og hevði tikið avgerðir, eg ikki hevði heimildir til, men hetta skilji eg einfalt ikki, sigur 63 ára gamli uppsagdi skúlastjórin Við Áir, Øssur av Steinum

UPPSØGN
Heini í Skorini
heini@sosialurin.fo

63 ára gamli Øssur av Steinum hevur arbeitt á serskúlanum við Áir síðani 1972, og tók hann við skúlastjórasessinum í 1980. Nógv er hent hesa tíðina kring skúlan við Áir, og nógv útskifting hevur verið í ALV-stýrinum. Øssur av Steinum hevur í tíðarskeiðnum frá 1980 til í dag verið skúlastjóri, men nú er hetta so eitt liðugt kapitull fyri hann.

Gamal og ónýtiligur

Øssur av Steinum greiðir frá, at hann ikki skilir viðferðina, hann hevur fingið frá stýrinum, og hann heldur, at tey hava skotið við síðuna av í tí ætlanarskrivi, hann fekk herfyri. Men hvørjar vóru ítøkiligu grundgevingarnar fyri uppsøgnini?

– Tað var sagt í skrivinum, at eg var gamal, ósamarbeiðsvilligur, ónýtiligur, hevði givið skeivar upplýsingar og hevði tikið avgerðir, eg ikki hevði heimildir til, men hetta skilji eg einfalt ikki. Eg fekk at vita, at eg hevði tvær vikur at verja meg í, og síðani varð samtykt, at eg skal sigast úr starvið í seinasta lagi 1. august 2004, greiðir Øssur av Steinum frá.

Hann heldur tað vera hugstoytandi, at hann als ikki hevur fingið høvi at svara fyri seg og koma á tal við ALV-stýrið, áðrenn stríðið kom so langt.

– Tá trupulleikar og ósemjur eru, plagar ein vanliga at seta seg niður og práta um tingini, men uttan at varnast nakað fekk eg eitt skriv við uppsagnarfreist og grovum ákærum, og veruleikin er, at avgerðin longu varð tikin av ALV-stýrinum, áðrenn eg yvirhøvur slapp til orðanna, sigur Øssur av Steinum. Hann heldur, at hann á henda hátt hevur verið verjuleysur og ikki fingið sømiliga og rættvísa viðgerð av ALV-stýrinum. Men um ALV-stýrið hevur skotið so langt við síðuna av, hvat eru so veruligu orsøkirnar til uppsøgnina av Øssuri av Steinum?

– Eg veit einfalt ikki, er greiða og einfalda svarið hjá Øssuri. 63 ára gamli uppsagdi skúlastjórin hevði annars ætlanir um at rigga av í næsta ár, og tí er uppsøgnin ein sera keðiligur endi á einum tíðarskeiði í einum skúla, hann hevur varað av í 24 ár.

Føroya Lærarafelag til hjálpar

Øssur av Steinum sigur, at ALV-stýrið tilvitað hevur lagt ætlanir um, nær ákærandi skrivið skuldi sendast til Øssur, har hann fekk at vita, at hann var ein trupulleiki, og at hann skuldi sigast úr starvi.

– Timingin við skrivinum er planløgd. Próvtøkurnar fóru júst í gongd á skúlanum, og løgtingið fór um somu tíð í summarfrí. Hetta visti ALV-stýrið, og tí hava tey valt júst hesa tíðina á árinum, sigur skúlastjórin.

Hann væntar, at onkur fyrispurningur hevði verið í tinginum um málið, um tingið ikki var farið í summarfrí, og sambært Øssuri er altíð meiri at gera í próvtøkutíðini enn aðrar tíðir.

– Eg havi als ongan møguleika fingið, og stýrið hevur í veruleikanum tikið avgerðina um mína uppsøgn, áðrenn eg saman við sakførara mínum fekk høvi at verja meg í tvær vikur, sum ikki hjálpti serliga nógv, sigur Øssur av Steinum. Hann vónar, at fakfelag hansara, Føroya Lærarafelag, fer at gera okkurt við málið og verja hann.

Ósannar ákærur

Spurdur meiri nágreiniliga, hvørjar ítøkiligar ákærur eru í skrivinum frá ALV-stýrinum, fer Øssur aftur í fortíðina og byrjar at greiða frá ymsum viðurskiftum, sum møguliga eru orsøkir til núverandi stríð.

Øssur av Steinum sigur, at tíðarskeiðið síðani 1980 hevur verið eyðkent av áhaldandi broytingum og útskiftingum, og kanska eru orsøkirnar fyri núverandi stríði at finna í fortíðini, hóast hann einki skeivt sigur seg hava gjørt, og hóast hann einki ítøkiligt boð hevur uppá, hvat í fortíðini kann vera ein orsøk til uppsøgnina.

– Seint í 90´unum var Jákup Lindenskov formaður í stýrinum og segði fyristøðukvinnuna á skúlanum úr starvi. Beint eftir hetta segði alt stýrið seg sjálvt úr starvi, og so varð eg noyddur at vátta lønir og standa fyri tí umsitingarliga, tí eingin hægri myndugleiki var har, greiðir Øssur frá. Síðani kom Helena Dam á Neystabø til sum avvarðandi landsstýriskvinna, og hon setti nýtt ALV-stýri við Bartali Kass á odda á nýggjári í 2000.

– Hesi lovaðu okkum gull og grønar skógir, men eftir ein einstakan fund sóu vit ongantið halaferðina aftur á teimum. Tey settu eina nýggja fyristøðukvinnu, men starvsfólkini vóru so ónøgd við hesa, at eg varð noyddur at boða stýrinum frá, og so var kvinnan flutt, greiðir Øssur frá. Hann fekk í 2001 síðani sjálvur bræv frá stýrinum um, at nú hevði hann pedagogisku, undirvísingarligu og umsitingarligu leiðsluna, og síðani hevur hetta verið støðan.

Øssur av Steinum hevur í hesum tíðarskeiði tikið avgerð um, at útgjaldingarnar hjá skúlanum skulu fara gjøgnum gjaldstovuna, tí ALV-skúlin kom á fíggjarlógina 1. januar 2003. Hetta varð gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið eftir ynski frá Fíggjarmálaráðnum. Eisini hevur hann arbeitt fyri, at ALV-skúlin skuldi flytast frá Almannamálaráðnum til Mentamálaráðið.

– Hesar broytingar og avgerðir mínar er ein av ákærunum hjá stýrinum móti mær, men Fíggjarmálaráðið staðfesti undan hesum broytingum, at eg hevði fullar heimildir og avgerðarrætt til at fremja hetta, so hasar ákærurnar hjá stýrinum halda ikki, sigur Øssur av Steinum.

Sambært Øssuri er onkur av hesum broytingum hansara í fortíðini møguliga orsøkin til, at hann nú verður koyrdur frá. 63 ára gamli skúlastjórin skal sum nú er vinka sínum lívsverki Við Áir farvæl áðrenn 1. august.

Tíverri fingu vit hvørki høvi at fáa viðmerkingar frá Føroya Lærarafelag – fakfelagnum hjá Øssuri av Steinum – ella forkvinnuna í ALV-stýrinum, Doris Hansen. Vónandi er hetta gjørligt í komandi útgávu.

NØVN Í VIKUNI

Niels Juul Arge 80 ár

Niels Juul varð føddur 16. juni 1924 í Klaksvík. Foreldur hansara vóru, Petra Joensen hjá Óla klokker og Magnus Arge, vanliga róptur Argja Magnus.

Niels Juul og Óluva vóru tvíburðar og nummar trý í røðini av 9 systkjum.

18. desembur í 1949 giftist hann við Henriettu Hansen, vanliga rópt, Eia. Tey eiga børnini Siggu, gift við Kára Borgarklett, Petru, gift við Hjørleif Poulsen og Andrias, giftur við Gunnhild Waag Høgnesen. Niels Juul eigur 9 abbabørn, sum trúliga vitja abba og ommu.

Sum blaðungur fór hann í blikksmiðjulæru á Fornagørðum, og 7. februar í 1949 byrjaði hann fyri seg sjálvan. Tað er lív í blikksmiðjuni enn, og eru tað dóttirin, Sigga og versonurin, Kári, sum reka blikksmiðjuna.

Tað, sum Niels Juul helst er mest kendur fyri, er klokkarastarvið í Christianskirkjuni, sum hann trúfast hevur røkt, síðani hann í 1960 tók við starvinum eftir faðir sín. Frammanundan hevði hann avloyst pápa sín, og í mai í ár vóru liðin 65 ár, síðani hann ringdi í gomlu kirkjuni á fyrsta sinni.

Klokkarastarvið hevur á ein hátt gingið í arv, og tók pápi Niels Juul við starvinum eftir verfaðir sín. Nú eru tað sonurin, Andrias og versonurin Hjørleif, sum avloysa Niels Juul, tá honum býðst frá.

Í samkomuni, Emmaus, hevur hann eisini verið sera virkin, bæði á møtum og í sunnudagsskúlanum.

Niels Juul dámar sera væl at fáast við seyð, og dagliga hevur hann verið at sæð á trøðni millum Grøv og Oyrar, har hann eisini veltir epli og setur niður rabarbur.

Flestu runda føðingardagar, hava Niels Juul og tvíburðasystirin, Óluva, hildið saman, og høvdu tey sæð fram til at halda 80 ára føðingardagin saman í kirkjukjallaranum. Men so skuldi ikki verða. Óluva varð tikin heim til Harran og borin til hvíldar seinasta mikudag.

Vit ynskja Niels Juul hjartaliga tillukku á stóra degnum og Harrans signing á lívskvøldinum.

Føðingardagurin verður hildin heima saman við familjuni.

Dagurin

16. juni. Tycho. Í fjórðu ella fimtu øld var hann biskupur í Ámatus á Kypros.

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Arnold Abrahamsen sjeytifimm ár

17. juni verður maðurin sjeytifimm. Er okkum lív lagað, so blíva vit tað, sum eingin vil, gomul. Hóast aldurin nartlar av okkara kroppi tíðliga og seint, so taka hesar flidnu rendur væl ímóti aldurdóminum. Ja, hjá føðingardagsbarninum stendur við klettin, nú hann fer um Kappan. Hann hevur í lívi sínum við stak arbeiðsamur, treiskur og framfýsin, og ikki sørt av lívrunnum mentanarmynstri er í Fuglafirði, sum hann hevur verið við at mynda. Hornorkestrið og Badmintonfelagið var hann við at stovna, virkin í Sjónleikarfelagnum og Fuglafjarðar sangkóri í mong ár, kvøldskúlanum og ikki minst í handilsskúlanum, sum hann leiddi frá 1968- 82. Hansara dagliga yrki var lærari í Fuglafjarðar skúla frá 1953 til 1981, og eftir tað fór hann í starv í Landsskúlafyrisitingini sum undirvísingarleiðari til 1996, tá ið hann legði frá sær vegna aldur.

Hetta er so ein partur av tí, sum hann hevur nomið við í sínum lívsyrki.

Arnold rennur ikki løturnar av sær í kurvastólinum, men dagliga gongur hann niðan á Skarð, ja, hansara navn átti ikki einans at staðið í bókini Føroyskir fólkaskúlalærarar, men eisini í Guinnes, sum maðurin, ið hevur verið á Skarðinum flestu ferðir. Myndin av fólki, sum hava gingið hesar leiðir dag um dag og ár um ár, er tær í huga. Farleiðin, har forfedrar okkara gingu, tá ið farið varð á fjall, til neytar, í torv, og ørindi bygdanna millum, so var tað Skarðið, portrið,

sum farast skuldi um - norðurum til skyldfólk og kenningar, men hugsandi er, at Skarðið dregur. Umhvørvið her er fjálgt og hugnaligt á summrið - men sanniliga eisini kann tað bíta frá sær á hávetri, tá ið landnyrðingurin hvessir á tonn, tá er ikki tespiligt á Skarðinum.

Her uppi situr tú í tínum egnu tonkum og hugsar. Portrið á Skarðinum er ein ikon, ið letur upp fyri so mongum, og í Arnoldsa verð eru so nógvar søguligar ikonir, sum dag og dagliga renna kapp við vitan hansara um søgu og søgulig brøgd víða um. Áhugin fyri tí søguliga hevur altíð verið stórur, og nógvar hava løturnar verið, tá ið søgumaðurin Arnold segði frá bæði í skúlanum og heima við hús. Tá er hann umbroyttur í sini vitan, og vit onnur, sum bert vita eitt dism av tí søguliga, mugu bert taka hetta til eftirtektar og goyma tað í onkrari skuffu í "hardiskinum" og trýsta á "safe as".... sum Arnold segði.

Ikki bert Skarðið dregur, men eisini pensjonistasvimjingin leygarmorgun í vátum vatni eru løtur, sum eru ógloymandi, tá ið menn, pensjonistar í svimjihylinum, siga frá livandi løtum í tí farna . Hetta er næstan sum í tí gamla Rom, men munurin er bara tann, at hetta eru vanlig fólk - fæloys-ingar og gott fólk, sum eiga hesa løtuna. Her svambla 75 ára gamlir menn sum selur á sundi. Arnold er ein teirra og brúkar hann allar sínar líkamligu og søguligu hestakreftir til svimjingarløtuna leygarmorgun.

Tá ið menn eru lidnir við svimjingina, hevur Arnfinnur Olsen borðreitt við morgundrekka, bollum, osti og gulari piparfrukt. Ja, hetta er ikki einans gamlamannakæti, sum dregur av sær, men hetta er sannur "kulturur" - ein nýggjur táttur í okkara fólkamentan í bygdini.

Nú Arnold fer um tey sjeytifimm árini, er hetta ein heilsan ovast uppi frá og í lítla morgunhavið í skúlanum. Heilsaður verið tú á føðingardegi tínum við ynskjum um nógvar góðar túrar niðan á Skarð og svimjiløtur í svimjihylinum saman við pensjonistabólkinum In á Yellow Submarine.

Hjartaliga til lukku

Frits

30 ára starvsdagur

Mín góði vinur Jákup Frants Larsen. Tíverri lá tað ikki fyri at vitja teg tann dagin, tá ið kommunan hevði opið hús.

Ja, at hava sitið í 30 ár sum skrivari í kommununi, tað eru ikki 30 dagar, nei, tað fer upp um 10.000 dagar. Tað eru nógvar fundarfrásøgnir og nógv orð skrivað øll hesi ár.

Nú kom eg at kenna Jákup Frants sera væl meðan eg sat í bygdaráðnum í mong ár. Eg kom skjótt at siggja, at Jákup Frants var ein persónur, sum ein kundi líta á allan vegin ígjøgnum.

Ein tekur ikki munnin ov fullan, tá ein metur hann sum eina alfrøðibók (leksikon). Hann er inni í øllum tingum, hann er ein sera gløggur maður og sera beinasamur maður at hjálpa, um ein heitir á hann. Hann var og er nógv avhildin av teim bygdaráðunum, ið hava sitið, og eisini av sínum bygdarfólki.

Kommunan hevur eisini ein annan sera fyrikomandi og beinasaman mann at hjálpa, har tað er neyðugt. Tað er Pætur Joensen, verkfrøðingur. Hann hevur eisini sitið í nógv ár á skrivstovuni. Kommunan er annars sera væl fyri. Her verður nógv gjørt, so Pætur hevur ígjøgnum hesi mongu árini lagt nógv stórarbeiði til rættis, og sum nú eru liðug gjørd.

Fuglfirðingar hava eisini ein sera skilagóðan og ágrýtnan borgmeistara. Og tá hann so hevur gott fólk aftan fyri seg, tað veri seg býráðslimir, skrivstovufólk og borgararnar, so kann tað ikki annan enn ganga væl í einum býi.

Eg ynski tykkum góða eydnu í framtíðini í tykkara arbeiði.

Símun P. Poulsen
Fyrrv. bygdaráðslimur

Dugnaskaparútbúgving í motorpassing

Mánadagin 14. juni 2004 fingu næmingar á Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla og Maskinmeistaraskúlanum prógv í dugnaskaparútbúgving í motorpassing.

Aftara rað frá vinstru: Steen Juul Petersen lærari, Zacharias Bech, Virgar Zachariasen, Jónleif á Svínafløtti, Ólavur Jacobsen, Eyðfinnur Steffansson.

Fremra rað frá vinstru: Fritleif Henriksen kvøldskúlastjóri, Gunnar Skúvadal, Christian Christiansen, Tórbjørn Sæbúð, Pætur Hansen.

Andras Mortensen og Martin Thomsen mangla á myndini

Mynd: Magnus Gunnarsson

80 ár

Í dag, 16. juni, verður Niels Juel Arge, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin heima saman við teimum nærmastu.